# Sektin á, um yvirtikin mál fungera ella ikki!!

**Stórur vandi er á ferð, tá ið yvirtøka er eitt endamál í sær sjálvum og ikki vælferð føringa ella Føroya. Nýggi formaður Fólkafloksins ætlar at yvirtaka 22 mál tey næstu 7 árini. Heldur skuldi hann fyrst roynt at fingið mál, hann sjálvur hevur yvirtikið, at fungera í tí dagliga**

JOHAN PETERSEN



Í vikuni, ið fór, bleiv Jørgen Niclasen valdur til nýggjan formann í Fólkaflokkinum. Tillukku við tí. Í samrøðu við blaðmann kemur framm, at nýggi formaðurin ætlar at seta sær sum mál, at yvirtaka 22 málsøkir tey næstu 7 árini. Loysingarflokkarnir – Miðflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin – fegnast, meðan Tjóðveldisflokkurin fyrst vil síggja úrslit, áðrenn hann trýr stavnhaldinum hjá nýggja formanninum.

**Yvirtøka endamál í sjálvum sær**
Hvussu loysingarpolitikarar hugsa, kom týðuliga fram undir viðgerðini av løgmansrøðuni, tá ið Jógvan á Lakjuni í samband við yvirtøkuna av fólkakirkjuni segði, at "nú var komið á mál"!! (Hann skundaði sær tó at siga, at enn var nógv eftir). Men tað, ið hjartað er fult av, floymir muðurin yvir av.

Hugsi ikki, at ein yvirtøka í sjálvum sær er nakar trupuleiki – tað kann sambært nýggju yvirtøkulógini ornast við einum frímerki ella einum maili til donsku stjórnina. Men trupuleikin er, tá ið yvirtøkan er framd, at fáa tey yvirtiknu málini at fungera undir føroyskum yvirvaldsrætti.

**Yvirtøkur verri fyri føringar**
Tað munnu vera fá mál, ið eru blivin betri av at hava verið yvirtikin, meðan vísast kann á nógv mál, ið eru vorðin verri eftir eina yvirtøku. Bert fyri at neva nøkur fá, so kann ikki sigast, at yvirtøkan av skúlaverkinum, tilbúgvingini, sjóbjargingarstøðini, nummarplátunum hjá Akstovuni ella Skipaeftirlitinum hevur gagnað føringum.

Hví? Ikki tí, at stavsfólkini á hesum stovnum er ódugnalig, men tí at føroyskir loysingarpolitikarar vilja billa føringum inn, at yvirtøkur ikki kosta nevnivert, og tessvegna verða yvirtiknir stovnar girdir í politiskar spennitroyggjur og í den grad forsømdir, bert "tí komið er á mál", tá ið yvirtøkan er framd.

Yvirtøka til egið valdømi Eitt av "brøgdunum" hjá nýggja formanni Fólkaflokksins var sum landsstýrismaður í fiskivinnumálum at yvirtaka Skipaeftirlitið. Tað hendi 1. jan. 2002. Hann hevur helst hugsað, at "komið var á mál", tá ið stovnurin var blivin føriskur og lagdur í hansara valdømi. Tað skuldi ikki kostað meir enn 8 starvsfólk at reka henda stovn – hóast hann fekk at vita frá serkønum, at stovnurin skuldi hava minst 20-25 starvsfólk, um hann skuldi megna sína uppgávu.

Hvat er so hent? Nú eftir 5½ árum hevur stovnurin enn ikki fótað sær. Skipaeftirlitið skrivar framvegis í fleiri regluverkum sínum 1. jan 2002! Ikki tí, at tey ikki eru dugnalig á Skipaeftirlitinum - tí tað eru tey – men tey hava fingið fleiri uppgávur, men ikki tilsvarandi starvsfólkamanning. Nú eru tey 12 starvsfólk. Ella við øðrum orðum er Skipaeftirlitið yvirtikið við minst 5½ árum ov stuttari fyrireikingartíð.

Og hvør eigur upptøkuna? Út frá vitleysum fortreytum. Jú, landsstýrismaður Sambandsfloksins í fiskivinnumálum.

**Norrmenn, týskarar, ongilsmenn og fransmenn í staðin fyri danir**
Fyri at fáa gerandsdagin at fungera, hava klassafeløgini fingið nógvar av teimum uppgávum, sum Skipaeftirlitið fyrr hevði undir donskum yvirvaldsrætti – norrmenn (Det Norske Veritas), týskarar (Germanischer Lloyds), ongilskmenn (Lloyds Register) og fransmenn (Bureau Veritas). Fyrr var hetta ókeypis fyri skipaeigararnar, men klassafeløgini taka seg væl betalt, ja sera væl.

**Soleiðis fungera yvirtøkur**
Soleiðis fungera yvirtøkur. Heldur enn at hugsa um fleiri yvirtøkur, áttu ansvarligir politikarar at hugsa um, at fáa yvirtiknu málini at fungera til dagligt. Hetta átti Jørgen eisini at hugsa um.

# Bjargaði manningini

**Í góðveðrinum hóskvøldið í farnu viku, var ein russiskur trolari so óheppin at renna á Flesjarnar. Hann rendi seg so fastan at hann stóð báði aftan og framman**

A. GUTTORMUR DJURHUUS



Trolarin slapp ikki av aftur við egnari megi, tí ein klettur var komin upp gjøgnum skrokkin, og sendi hann tí út neyðarkall. Sum sjófartstjóð hava vit nátt sum dag, tøka hjálp til slíkar neyðstøður. Hóast veðurmenninir spáddu illveður tók bjargingarstøðin ta djørvu avgerð at senda hjálp í stundini, og skjótt vóru hjálparskip og tyrlur á vanlukkustaðnum. Rætt var avrátt og varð manningin bjargað í øllum góðum. Gud havi lov fyri tað.

Ikki minnir hendingin sørt um stríðið í Runsival, tá Gud steðgaði sólini til at hjálpa teimum kristnu til sigurs. Veðurfrøðingarnir spáddu illveður, men tað gjørdist slíkt dýrdarveður at russarnir kundu spáka sær turrskøddir yvir á bjargingarflotan og verða fluttir til Havnar í øllum góðum.

At trolarin seinni fór til botns við nøkrum litrum av olju umborð, var harmuligt, men tað týdningarmesta í hesum sambandi er at einki mannalív fór til spillis. Tað eiga Gud og MRCC-støðin allan heiðurin av.

# Endurtøka av fyrispurningi

POUL MOHR



Í Dimmalætting 27.7.07 hevði eg ein fyrispurning til løgmann Jónnes Eidesgaard og nú fyrrverandi formann fólkafloksins Anfinn Kallsberg. Enn er einki svar komið. Lesarabræv mítt var soljóðandi:

Til Jóannes Eidesgaard løgmann og Anfinn Kallsberg formann Fólkafloksins. Í Dimmalætting 27. juli nr. 104 hevur Jóannes Eliasen lesarbræv »Okkara danska umboðan í útheiminum«.

Í hesum sambandi fari eg at spyrja løgmann og Anfinn: Hevur Jóannes Eliasen skilt og endurgivið rætt úr hesum skjali, ella hevur hann púra misskilt alt tað, sum hann endurgevur?

Tað hevur eisini áhuga at fáa at vita, hvar og hvussu útreiðslurnar til okkara umboð í Brüssel, London og Reykjavík - lønir, skrivstovuhald o.a. - verða goldnar. Vónandi fái eg skjótt og greitt svart.

Teir øna ikki aftur, sum flestu kunnugt, er tøgn størsta vanvirðing av honum, sum spyr.

*Framhald av síðu 12*

Tú ein lítlan – eg ein stóran.

Útlendingapolitikkurin, sum hevur verið ein sorgarleikur, og sum nú landsstýrismaðurin sigur seg vilja loysa við danskari ES-lóggávu. Uttan nakra samráðing við ES um at veita føroyingum somu treytir í ES.

Innan sosiala økið er tørvur á nýggjum atgerðum og nýhugsan bygt á hugsjónir um rættindi og skyldur, nú gjáirnar eru grivnar nógv djúpri millum samfelagsbólkar við rikna politikkinum.

Innan gransking, útbúgving og mentan, har ein heilt annar politikkur og drívmegi skal til. Ikki minst skulu vit hava fólk heim til Føroya – eitt nú av teimum 21.000 føroyingunum, ið búgva í Danmark og har kvinnur eru í størum meiriluta.

Umhvørvispolitikkurin, har alt er fastlæst, og mál sum veðurlagsbroytingar og lívfrøðiligt margfeldni ikki hava verið tikin í álvara, men hinvegin øll uppskot feld.

Fiskvinnupolitikkurin og vinnupolitikkurin sum heild, har tað eru seráhugamálini sum ráða, og ikki ein fræls og liberal skipan, har jøvn kapping og somu treytir galda fyri øll og fyri allar vinnur. Ístaðin verða virðir forerd burtur og framíhjárættindi veitt – og ongin kann hava álit á neyðugu einskiljingunum, sum tær eru handfarnar av landsstýrinum.

Í javnstøðumálum, har vit skulu hava fleiri kvinnur inn har avgerðirnar verða tiknar.

Á pensiónsøkinum, har torast skal at lyfta lægstu bólkarnar upp og ikki tey, ið longu hava stórar pensiónir.

Á kommunala landkortinum, har nú má skerast ígjøgnum við framtíðar uppbýti og bygnaði millum land og kommunur.

Tí er greitt, at okkum tørvar eina uppgerð í føroyskum politikki. Vit mugu taka eitt val nú, so talvborðið kann ruddast og setast upp av nýggjum.

**Alternativið er greitt**
Tjóðveldisflokkurin er til reiðar. Vit hava greið mál, ið kunnu bera Føroyar inn í framtíðina. Vit hava enntá gjørt meira enn 100 ítøkilig uppskot, ið hava verið løgd fyri tingið seinastu 4 árini og eru klár at fremja. So her skuldu allir møguleikar verið fyri samstarvi við teir flokkar, ið vilja eina aðra leið í Føroyum, enn hana vit hava upplivað seinastu 4 árini.

Orsakað av fastlæstu støðuni í samgonguni, har lítlir áhugabólkar kunnu skáka hinar, hevur ikki eydnast at fáa meiriluta fyri flestu uppskotunum, hóast ongin ivi er um, at allarflestu tingfólk og fólk sum heild taka undir við teimum.

Eg kann bert nevna uppskotini um: Búskapargrunn; Tilfeingisbúð; at strika skattalættan; løgfrøði á Fróðaskaparsetrinum; stuðul til stakar uppihaldarar; øktar játtanir til gransking og mentan; at hækka lægstu fyritíðarpensjón, Kyoto-sáttmálan; at taka fult ræði á uttanríkismálum, útlendingamálum og loftrúminum; útjavningarskipan millum kommunur; uppskot um javnstøðu og rættartrygd.

Hesi uppskot eru feld upp til fleiri ferðir. Ístaðin verða rossahandlar og avgerðir, ið onga grundgeving hava, samtykt, hóast bert ein sera lítil partur av bæði tinginum og av fólkinum taka undir við teimum. (Lat meg bert nevna donsku ríkislógirnar, skúlaflytingar, skattalættar og fiskivinnulógarbroytingar). "Júmen, tað er ein semja í samgonguni" er afturvendandi mantraið – uttan mun til um allar grundgevingar tala ímóti.

**Summarið hjá Láksáfoss niðurbart**
Avleiðingarnar av ábyrgdarleysum politikki síggjast tíverri ikki fyrr enn rúma tíð eftir, at avgerðirnar eru tiknar. Tá hugsjónirnar og virðini verða slept, seyra tey spakuliga burtur. Fyrst fara hugsjónirnar og virðini. Síðani seyrar ábyrgdin burtur – úr øllum liðum. So sigrar líkasælan millum fólk. Vit verða rurað í blund við uttanumtosi. Til vit einaferð verða skrykt úr svøvni.

Vit hava nú fingið ein fíggjarmálaráðharra í hesari samgonguni, sum hevur sligið fast, at búskaparpolitikkurin hjá somu samgongu og hjá sínum egna flokki, hevur verið grundleggjandi skeivur. Djúptøknir ójavnar eru skaptir millum samfelagsbólkar og millum økir í landinum. Ístaðin er ferð koyrd á tey hjól, ið frammanundan mólu skjótast. Og hann hevur sagt seg verða samdan í øllum tí, sum andstøðan hevur ført fram og tekur undir við teimum uppskotum, ið andstøðan hevur lagt fram ár um ár, men sum eru feld.

Eg kann bert nevna uppskotið um Búskapargrunn, um at strika skattalættarnar, gera avtalur um fíggjarligt loft hjá kommunum, útjavningarskipan, at gera upp við rentustuðulin og annað. Hann hevur víst á, at útreiðslur eru fjaldar og lagdar uttanfyri fíggjarlógina. Ja, fíggjarmálaráðharrin hevur eisini sagt alment, at 2-300 mió. skulu finnast á fíggjarlógini at seta í Búskapargrunnin.

Tað man vera eindømi í heiminum, at ein stjórn hevur ein fíggjamálaráðharra, ið er so ósamdur við sína samgongu og so samdur við andstøðuni.

At hoyra Magna Láksáfoss í summar var eins og várið í Prag í 1968, tá fólk tordu at siga sína erligu hugsan og vildu hava broytingar í einari fastlæstari valdsskipan. Men alt bendir á, at summarið á Argjum 2007 hjá fíggjarmálaráðharranum gjørdist eins stutt og várið í Prag. Eftir ein samgongufund, er nú fast og fyribundið aftur, og samgongan skal ístaðin "royna at halda aftur í fíggjarlógini". Vit vita øll, at hetta merkir, at onki verður gjørt.

**Strika skattalættan og skriva út val**
Tað er meiningsleyst og ábyrgdarleyst at lata heystið ganga, har tað bert verða valballónir og ymsar desperatar royndir hjá flokkunum í samgonguni at pussa onkrar skerdar fjaðrar mótvegis veljaranum, sum fara at mynda politisku skipanina. Tað besta vit kunnu gera nú, er at semjast um at strika skattalættan fyri 2008, sum er samtyktur uppá nakkan av komandi løgtingi – sum ongin grundgeving finst fyri yvirhøvur – og síðani skriva út val. Tástaðni kunnu vit vinna á líkasæluni.